# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg gleði meg til at skifta orð um, hvussu vit skulu gera hetta landið betri at liva í hjá tí næsta ættarliðinum*

*(Hillary Clinton)*



*Ein av hesum verður amerikanskur forseti aftan á valið í heyst: Hillary Clinton, John McCain, Barrack Obama ella Mitt Romney*

# Tað verður ein teirra

## Vinnarar Super Tuesday

**Alabama:**
D: Barrack Obama 56%
R: Mike Huckabee 41%

**Alaska:**
D: Barrack Obama 74%
R: Mitt Romney 41%

**Arizona:**
D: Hillary Clinton 50%
R: John McCain 47%

**Arkansas:**
D: Hillary Clinton 69%
R: Mike Huckabee 61%

**California:**
D: Hillary Clinton 53%
R: John McCain 44%

**Colorado:**
D: Barrack Obama 66%
R: Mitt Romney 60%

**Connecticut:**
D: Barrack Obama 51%
R: John McCain 51%

**Delaware:**
D: Barrack Obama 53%
R: John McCain 45%

**Georgia:**
D: Barrack Obama 66%
R: Mike Huckabee 34%

**Idaho:**
D: Barrack Obama 80%
R: Velja 27. mai

**Illinois:**
D: Barrack Obama 65%
R: John McCain 47%

**Kansas:**
D: Barrack Obama 74%
R: Velja 9. februar

**Massachusetts:**
D: Hillary Clinton 56%
R: Mitt Romney 51%

**Minnesota:**
D: Barrack Obama 67%
R: Mitt Romney 42%

**Missouri:**
D: Barrack Obama 49%
R: John McCain 33%

**Montana:**
D: Velja 3. juni
R: Mitt Romney 38%

**New Jersey:**
D: Hillary Clinton 54%
R: John McCain 56%

**New Mexico:**
D:
R: Velja 3. juni

**New York:**
D: Hillary Clinton 57%
R: John McCain 51%

**North Dakota:**
D: Barrack Obama 61%
R: Mitt Romney 36%

**Oklahoma:**
D: Hillary Clinton 55%
R: John McCain 37%

**Tennessee:**
D: Hillary Clinton 54%
R: Mike Huckabee 34%

**Utah:**
D: Barrack Obama 56%
R: Mitt Romney 90%

**West Virginia:**
D: Velja 13. mai
R: Mike Huckabee 52%

### Stóri Týsdagurin svaraði ikki spurninginum, hvør verður forsetavalevni hjá demokratunum, men hjá republikanarunum kom John McCain styrktur burtur úr degnum

Tað stendur framvegis á jøvnum millum Hillary Clinton og Barrack Obama aftan á tann stóra valdagin í gjár.

Um 10-tíðina fyrrapartin hevði Obama fingið 553 valmenn og Hillary Clinton 547 í teimum 22 statunum, sum høvdu val í gjár. Her skal havast í huga, at av teimum serligu valmonnunum styðja 197 Hillary Clinton, meðan 106 styðja Barrack Obama. Serligir valmenn eru senatorar, guvernørar og flokksleiðslulimir. Fyri at tryggja sær uppstilling má eitt valevni hava minst 2.205 valmenn aftan fyri seg.

Hjá demokratunum vann Barrack Obama í fleiri statum enn Hillary Clinton. Hann vann í 12 statum har suðuri og har vesturi í landinum umframt heimastati sínum Illinois, og hon vann í átta statum, teirra millum heimastati sínum New York. Millum statirnar, sum Hillary Clinton vann í, er tann fólkaríki Kalifornia, og politiskir eygleiðarar siga, at júst sigurin í Kalifornia kann tryggja Hillary Clinton ta neyðugu undirtøkuna til floksfundin, sum endaliga skal tilnevna forsetavalevnið.

Men kappingin um valevnið hjá demokratunum fer at halda fram tær næstu vikurnar. Nú leygardagin verður val í Louisiana, og síðani koma lutfalsliga stórir statir sum Ohio, Pennsylvania og Texas.

### Romney taparin

Hjá republikanarunum var John McCain tann stóri vinnarin í gjár við at vinna í Kalifornia, New York, New Jersey og Illinois, meðan Mitt Romney fekk heitið tann stóri taparin. Kortini ætlar hann sær ikki at gevast.

- Tað er ikki liðugt enn. Vit halda fram við stríðnum, segði Romney við síni viðhaldsfólk í nátt.

Mike Huckabee fekk eitt betri úrslit, at flestu kanningar og eygleiðarar høvdu roknað við. Hann vann í fimm statum, men verður kortini ikki hildin hava nakran møguleika.




*Hillary Clinton var sjónliga fegin um úrslitið, tá hon takkaði veljarunum í New York í nátt*

## STUTT SAGT

### Vil hava Obama

Tað vakti ans, tá svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, í gjár segði, at hann vil helst hava Barrack Obama til amerikanskan forseta. Við tíðindafólk segði Reinfeldt fyrst, at hann hevði ikki verið serliga fegin, um ein republikanari vann forsetavalið í heyst. Tá tíðindafólkini spurdu, hvønn hann vildi hava, svaraði forsætisráðharrin, at hansara raðfesting er Barrack Obama sum nr. 1, Hillary Clinton sum nr. 2 og so republikanararnir John McCain og Mitt Romney sum ávikavist nr. 3 og 4. Svenskir eygleiðarar undraðust á, at Reinfeldt vildi hava ein demokrat til forseta, tá hugsað verður um, at hann hevur havt gott samband við republikanaran George W. Bush.

### Kreppa í Serbia

Sambært serbiskum fjølmiðlum sýtir Vojislav Kostunica, forsætisráðharri, fyri at kalla stjórnina saman til fundar at taka støðu til eitt uppskot um ein sáttmála við ES. Orsøkin sigst vera, at forsætisráðharrin er ímóti sáttmálanum, meðan meirilutin av samgonguni tekur undir við sáttmálanum. Sum skilst vil Kostunica ikki góðtaka sáttmálan, tí eftir hansara tykki bindur sáttmálin Serbia til at viðurkenna, at Kosovo fær sjálvstýri. Við at góðkenna sáttmálan kann Serbia tí gerast tað fyrsta landið, sum viðurkennir Kosovo, skal Kostunica hava sagt.

### Mótmæla príshækking

Fleiri túsund fólk gingu í gjár mótmælisgongu í fleiri býum í Mosambik, har tey mótmæltu, at tað er vorðið dýrari at koyra viðbussi. Í høvuðsstaðnum Maputu vóru mótmælini so harðlig, at løgreglan kendi seg noydda til at skjóta við gummikúlum fyri at spjaða mótmælisfólkið. Tað ljóðar, at eitt fólk doyði, tá mótmælisfólk og løgreglumenn brustu saman.